# **Nýggjar** bøkur




## Vaktari vísdómsins

Onnur bókin í røðini um Grønavatn eftir Josefine Ottesen er komin

Kubbagentan Píl og rókurin Olli royna at fáa skil á einari ósemju, sum hevur tikið seg upp millum smáverurnar við Grønavatn. Gamli Vaktari vísdómsins er deyður, og fleiri enn ein eru um boðið at gerast Vaktari. Sum í øllum góðum søgum skal tann, ið vinnur gera seg uppibornan til at vera Vaktari, og tað gerst bert við at vinna Svørð vísdómsins.

Bókin er 162 bls. og innbundin og hevur vakrar myndprýðingar eftir Emil Landgren.

Hon er væl egnað til 8-12 ára gomul børn. Karl N. Hansen hevur týtt úr donskum.

Fyrsta bókin, Stolni steinurin, kom út í 2008.

## Paulina og suttan

Paulina er rættiliga stór, og hon dugir longu heilt nógv. Suttan er altíð við henni, hana letur Paulina ikki frá sær. Í dag koma Marjun, Dánjal og lítlabarnið at vitja. Barnið eigur eisini eina suttu, júst sum Paulina. Tá ið tey fara á spæliplássið, missa tey suttuna hjá lítlabarninum. Lítlabarnið grætur sjálvandi, tí tað hevur stórliga brúk fyri einari suttu. Men nú er bara ein eftir – tann hjá Paulinu.

So hvat nú, Paulina?




## Toybókin um djór

Børn fara at dáma væl at hyggja at hesari stuttligu toybókini. Á aðrari síðuni hava myndirnar sterk litbrigdi fyri at stimbra sjónina hjá nýføðinginum.

Tá ið barnið verður eldri, kann bókin vendast, soleiðis at tað kann njóta tær bjørtu, litríku myndirnar.




**Tivoli Audio** Model One



kr. 1.599,-

RADIOHANDILIN
SP/F E. & P. PERSSON
NIELS FINSENS GØTA 16 • FO-100 TÓRSHAVN • TLF. 31 82 77

Restaurant Zitouna

VÆLKOMIN
á Mentanarnátt

Vit hava opið
frá kl. 11.30 og úteftir

Kl. 20.00 spæla
JAMES OLSEN OG KIM HANSEN
á terassuni

Lucas Debesartrøð 3 · Tórshavn · Tel 602220 · zitouna.org
zitouna@flatrate.fo

við Ánna 3
Norðragøta
Tel. 441039



Til børn, ung, kvinnur & menn

ROKOKO



Sjeikaligt til teir 2-8 ára gomlu frá REBUS

Í Miðlon · Hoyvíksvegur 67
100 Tórshavn · Tel 321755

SNÁK